**Fundarfrágreiðing frá lestrarráðsfundi 18.04.17**

**Á fundi:** Erika Anne Hayfield, adjunktur forkvinna
Turid Christophersen, lesandi næstforkvinna
Jens Christian S. Justinussen, útbúgvingarleiðari
Bárður Larsen, útbúgvingarleiðari
Ingi Jacobsen, lesandi
Emil Hermansen, lesandi
Sigrid Joensen, skrivari

1. **Fundarfrágreiðing og uppfylging frá seinast:**
   Felags eftirmeting mikudagin 24. mai frá 12-13.30 á 4 hædd. Seinasta freist at siga frá, er 25. apríl, um eftirmetingin kann verða 24. mai.

2. **Umsókn um góðskriving (ensk útgáva):**
   Umsóknarblaðið umsetast til enskt og leggjast út á heimasíðuna við smávegis viðmerkingum. Erika tosar við Martin M. Olsen.

3. **Góðskrivingar:**
   *N.N.*, lesur masterlæru í Sosialvísindi. Lat váttan inn um skeiðini tikin á RUC. Umsóknin er góðkend. Skal skrásetast í próvbókina fyri 30 ECTS.
   *N.N.*lesur Sosialvísindi og Samfelagsplanlegging.
   Hevur fingið góðskrivað 60 ECTS frá University of Malta.

4. **Skeiðslýsingar:**
   Skeiðslýsingar í búskaparfrøði skulu skrivliga viðgerast av limum í Lestrarráðnum og sendast til Eriku í viku 16. Skeiðslýsing Green Growth Dialogue, PHD skeið er góðkend.

5. **Námsskipan Masterlæra:**
   Smávegis viðmerkingar til Námsskipanina. Høvuðsevnið, sum vórðu viðgjørd vóru í hvønn mun tað kann víkjast frá uttanlandsuppihaldi og um Lestrarráðið skal góðkenna persónligu profilarnar ella um tað er útbúgvingarleiðari. Mett var, at tað eigur at vera útbúgvingarleiðari. Hetta skal Erika umrøða við útbúgvingarleiðarar. Fleiri minni týðandi viðmerkinger eru til námsskipanina. Hesar sendir Erika skrivliga til útbúgvarleiðara. Limirnir í Lestraráðnum venda sær við møguligum øðrum viðmerkingum til Eriku sum skjótast. Lestrarráðið ynskir at síggja námsskipanina aftur.

   **Ymiskt:**
   Kalla Annu Tórgarð inn til næsta fund um góðskrivingar, sum skulu skrásetast í próvbókini.